# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Hanna Jensen, løgtingsmaður

**Svarari:** Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

**Evni:** Koronupass

**Spurningar:**

1. Á hvørjum heimildargrundarlagi hvílir nýtslan av koronupassinum í føroyska samfelagnum?
2. Hvør er orsøkin til, at spurningurin um at nýta koronupassið ikki er viðgjørdur í Løgtinginum?
3. Hvørjar eru heilsufakligu grundgevingarnar fyri at seta sum treyt nýtslu av koronupassi ymsastaðni í føroyska samfelagnum ?
4. Eru heilsufaklig prógv um, at koronupassið tálmar smittutrýstinum í samfeløgum, har tað verður nýtt, og er hetta effektivari enn koronukanningar ?
5. Hvat merkir tað løgfrøðiliga, tøkniliga og praktiskt, at føroyska koronupassið er ES-góðkent?
6. Kann uttan serstaka lógarheimild verða álagt privatpersóni at vísa ella upplýsa um viðkvæmar upplýsingar so sum kanningarúrslit og koppsetingarstøðu fyri feløgum og øðrum privatpersónum fyri at luttaka í almennum og privatum tiltøkum?
7. Hava almennir og privatir arbeiðsgevarar í Føroyum heimild at krevja upplýsingar um heilsustøðuna hjá sínum starvsfólki t.d. gjøgnum koronupass, sum treyt fyri at kunna møta til arbeiðis ella fáa eitt arbeiði?
8. Ætlar løgmaður at tryggja teimum, sum ikki ætla at nýta talgildar heilsuupplýsingar sum atgongumerki til arbeiði og annað virksemi í samfelagnum, frítt at ferðast og virka í samfelagnum ?
9. Ætlar løgmaður at tryggja minnilutanum av føroyingum, sum ikki eru koppsettir fyri koronu, framvegis at kunna virka frítt í føroyska samfelagnum ?

**Viðmerkingar:**
Á tíðindafundi 9/11 kunngjørdi løgmaður, at nú skuldi koronupass nýtast í føroyska samfelagnum frá leygardegi 13/11. Hetta kom sum ein kvøkkur hjá fleiri. Inntil tá hevði sitandi stjórn staðið saman um, at koronupassið, sum er fyrireikað innan heilsøkið, einans var gjørt fyri at føroyingar, sum skuldu ferðast uttanlands, kundu fáa eitt slíkt frá føroyskum myndugleika.
Nú skilst millum manna, at koronupassið elvir til fleiri spurningar, enn tað svarar uppá, um m.a. dátutrygd, viðkvæmar heilsuupplýsingar, rættartrygd hjá føroyingum og frælsi at velja, um demokratiskar heimildir til koronupassið, um minnilutaverju - fyri at nevna nakrar. Av tí at løgmaður og sitandi landsstýri gjørdu púra greitt, at m.a. koppseting fyri koronu er frítt val, hava ivamál nú tikið seg upp. Mong uppliva, at koronupassið leggur eitt trýst afturat á tey, sum longu kenna trýst á tað lovaða fría valið – ikki minst nú borgarstjórin í Havn tosar um hetta.

Íslendski smittu-landslæknin Þórólfur Guðnason, skrivar so seint sum 17/11 í grein á covid.is, at eingin heilsufaklig orsøk er at gera mun á m.a. koppsettum og ókoppsettum, sum koronupassið er dømi um. Fleiri stúra um frælsisrættindi føroyinga – tí verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 22. november 2021**

Hanna Jensen